LM-072/2025

FYLGISKJAL 11

CTD felagið tann 22.10.2025

Hoyringsskriv til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið

(Berarakanning fyri fólk millum 18 og 45 ár og makar hjá berarum

Felagið metir tað er sera gott við hesi broyting og tekur undir við henni.

Felagið vil tó viðmerkja at hóast CTD ikki er ein deyðilig sjúka tá hon er staðfest, so ynskir felagið at CTD eisini verður umhugsað og tikið við í tilboðið um berara kanning, soleiðis at børn við CTD fáa best møguligu byrjan uppá lívið. Í dag verða mammur, ið ganga við barni, ið møguliga hevur CTD, settar í viðgerð við karnitin, soleiðis barnið ikki kemur at mangla karnitin. Eisini er hetta gott fyri mammuna sum er berari. Tískil meta vit tað er sera gott um tilboðið um berarkanning verður víðkað til eisini at umfata CTD.

Eisini vilja vit vísa á at tað er neyðugt at føroyingar búsitandi uttanlanda hava møguleika at lata seg kanna.

Vegna CTD felagið

Frankie Jensen, Formaður